


www.oljan.fo

**Jan Müller** 13 - 02 - 2012

# Eingin olja í brunni hjá Faroe Petroleum

Faroe Petroleum boðar frá at komið er á mál við at bora Kalvklumpen leitimiðið (Faroe 20%) í norska partinum av Norðsjónum, men úrslitið gjørdist ikki so gott sum vónað. Byrjað varð at bora Kalvklumpen brunnin 10. januar og borað varð niður til leitimiðini á 2.950 metra dýpi; men eingin olja varð funnin. Fyristøðufelagið á loyvinum er Det Norske Oljeselskap, ið hevur 40% av loyvinum. Í samtakinum luttóku eisini oljufeløgini Norwegian Energy Company ASA og Bayerngas Norge AS. Songa Delta boripallurin varð nýttur til boringina. Brunnurin er nú typtur. Brunnurin er tann fyrsti, sum felagið borar á norðara parti av Utsira rygginum, har fyri stuttum Atla fundið varð staðfest nær við Kalvklumpen økið. Úrslitið av boringini er skuffandi, men nógv vitan er fingin til vega, sum minkar munandi um váðan á loyvunum, sum felagið hevur á økinum, m.a. PL626 Shango, PL414B Oksen og PL507 Tetrao/Knorke. Kalvklumpen er ein av fleiri leitibrunnum, ið Faroe Petroleum borar í 2012, sum m.a. fevna um North Uist, vestan fyri Hetland, og Clapton, Cooper og Rodriguez á norskum øki. Í løtuni verður T-Rex brunnurin boraður í Noregi.